## Subaru Forester



Tá amerikanska IIHS (Insurance Institute for Highway Safety) sum t.d. krasj-testar bilar framman, aftan og frá síðunum, her fyri testaði 12 miðalstórar SUV, bleiv Subaru Forester klárt nummar eitt.

*Kelda: www.presseinformation.com*

## Goodyear 4x4 dekk



Amerikanska Goodyear dekkverksmiðjan hevur framleitt eitt sergjørt dekk til "off roadarar". Goodyear HP eftirlíkar ynskir hjá brúkarunum um eitt dekk, sum hevur serlig evnir at tilpassa seg veðrið og vegin, t.v.s. um vegurin er vátur, hálur o.l.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Range Rover



Californiska fyritøkan, Strategic Vision, sum ger ymiskar brúkarakanningar, hevur kosið Range Rover sum tann besta luksus-SUV. 31.000 eigarar av bilum, sum vóru yvir 90 dagar gamlir, vórðu spurdir.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Opel Meriva við nógvum møguleikum




*Jens Sigurð Simonsen, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, við nýggja Opel Meriva 1,6*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Meriva er gjørdur við Opel Zafira sum fyrimynd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Við FlexSpace systeminum eru nógvir møguleikar fyri innrætting*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Á bilasøluni P/F Meinhardt Arge hava teir nú fingið nýggja Opel Meriva, ið er gjørdur við Opel Zafira sum fyrimynd. Meriva er ein sera rúmligur bilur við einum FlexSpace systemi, har nógvir møguleikar eru fyri innrætting**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Meðan verkfallið her hjá okkum stóð við í umleið ein mánað, stóðu nógvir nýggir bilar og bíðaðu eftir at koma til Føroyar. Ein av teimum var Opel Meriva. Við "FlexSpace" systeminum er Opel Meriva ein bilur við heilt nýggjum møguleikum fyri innrætting. Meriva er genialt innrættaður, t.d. er baksetrið deilt í trý, soleiðis at t.d. mittasta setrið kann leggjast niður, síðan kunnu tey uttaru setrini flytast inn móti hvørjum øðrum og flytast aftur ella fram. Møguleiki er eisini fyri at velja ímillum gott beinpláss á baksetrinum ella stórt viðførisrúm. Um øll trý baksetrini verða løgd framyvir og løgd saman, verður gólvflatan 170,0 cm í longd. Hetta eru bert nakrir av møguleikunum við innrættan av Meriva við "FlexSpace" systeminum.

Bilurin fæst við fimm ymiskum motorum, tveimum 1,6 litur bensinmotorum við ávikavist 87 og 100 hk og einum 1,8 litur bensinmotori við 125 hk og tveimum 1,7 litur dieselmotorum við ávikavist 75 og 100 hk.

Meriva fæst við hópin av eykaútgerð sum t.d. "Twin Audio", har tey á baksetrinum við høvuðtelefonum kunnu lurta eftir einum øðrum programmi enn tey á forsetrinum. Bilurin fæst eisini við Xenon forlyktum, aircondition, leðurinntrekki og alu-felgum. Eisini kann bilurin leverast soleiðis, at hann hevur tvey sóltak. Meriva verður gjørdur í Zaragoza í Spanien. Bíligasti Mevira kostar 169.000 krónur.

### Opel Meriva 1,6 16V

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur 4 syl.16V við100 hk ECOTEC bensinmotorur |
| 0-100 km/t | 13,3 sek |
| Bensinnýtsla | 13,3 km/l |
| Dekkstødd | 185/60-15 |
| Longd | 404,2 cm |
| Breidd | 169,4 cm |
| Hædd | 162,4 cm |
| Viðførisrúm | 491 litrar |
| Prísur | Kr. 189.000,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v.Oyggjarvegin<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.bilarge.fo |

ítróttur

Nr. 128 • hósdagur • 10. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Blikur fremst

Í blaðnum í gjár stóð, at Sílið lá fremst í samlaðu FM-kappingini í 5-mannaførum hjá gentum. Tey, sum hugdu eftir støðuni aðrastaðni í blaðnum, varnaðust, at hetta ikki er rætt. Tað er hinvegin Blikur, ið eigur fyrsta plássið í 5-mannaførum hjá gentum, meðan Sílið er á øðrum plássi.

Mistakið varð upprunaliga rættað í greinini, men tíverri kom skeiva útgávan av greinini við í blaðið. Vit biðja lesaran halda okkum til góðar.

**Stefan**

# Gentulið hjá Støkk til Spania

**Komandi fríggjadag fer stórkappingarliðið hjá gentum hjá Støkk til Spania at luttaka á eini altjóða fimleikastevnu í suðurspanska býnum Alicante. Stevnan, sum DGI, Dansk Gymnastik og Idræt, saman við Býráðnum í Alicante skipar fyri, er í døgunum 13.-19. juli**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*



*Fremst frá vinstru: Sonja Joensen, Anna Joensen, Karla Maria Gaardbo og Monika Weihe Poulsen. Í miðjuni frá vinstru: Jenny á Reynatrøð, Henny Joensen, Hervør Heinesen og Rósa Heinesen. Aftast frá vinstru: Rannvá Troest, venjari, Ann Mari Róin Johannessen, Jónvá Joensen, Bodil Tausen og Joan Simonsen. Á myndini vanta: Kristina Olsen og Súsanna Thomassen*

Ikki færri enn 3000 fimleikarar hava boðað frá luttøku á stevnuni. Flestu teirra úr Danmark og Spania, men eisini koma gestalið úr øllum heiminum til Alicante at vísa síni kynstur og vera saman við øðrum fimleikarum.

Á stevnuni skulu genturnar framføra tvær ferðir á strondini og á tí serliga altjóða kvøldinum, sum er størsta einstaka tiltakið á stevnuni, har bert nøkur fá lið sleppa at framføra. Her kann leggjast afturat, at genturnar skulu inn á gólvið beint eftir framførsluna hjá verðinsliðnum hjá DGI, sum er eitt lið við 15 gentum og 15 dreingjum, ið hvørjum árið verða úttikin til eina framsýningarferð runt tað mesta av verðini í eitt heilt ár.

Eisini eru genturnar bodnar at taka lut á einum sponskum kvøldi, sum býráðið í Alicante skipar fyri. Restin av fimleikastevnuni fer at verða brúkt til venjing saman við øðrum venjarum og fimleikarum, at hyggja at fimleiki og fáa íblástur til komandi fimleikaárið.

### Nýta nógva tíð til fimleik

Genturnar, sum manna liðið, hava á hvørjum árið síðan 1998 umboðað Støkk í stórkappingum hjá Fimleikasambandi Føroya. Hesi árini hava genturnar brúkt størsta partin av síni frítíð til fimleik, tí teir fimleikarar, sum umboða sítt felag í stórkapping, eru eisini við á øðrum liðum hjá fimleikafelagnum. Genturnar hava hvørja ferð fingið góð úrslit í stórkappingunum, og eru tí ein góð fyrimynd hjá yngru fimleikarunum hjá Støkk.

Seinnu árini hava genturnar, foreldur teirra og venjarin tosað um møguleikan at farið uttanlands at vísa øðrum føroyskan fimleik og samstundis at fáa eina rættiliga fimleikaupplivíng. Tá tað hoyrdist, at DGI fór at skipa fyri eini altjóða fimleikastevnu í Alicante í summar, var farið undir at kannað møguleikan fyri føroyskari luttøku. Tá tað fyrst í hesum árinum vísti seg, at kostnaðurin fyri innvist, uppihald og ferðing ikki fór at verða alt ov høgur, varð avgerð tikin um at teknað liðið til stevnuna. Seinastu fýra mánaðirnar hava genturnar og foreldrini við ymiskum tiltøkum og arbeiði savnað pening til ferðina. Harafturat hevur liðið fingið stuðul frá Støkk og Fimleikasambandi Føroya.

Ferðalagið, sum fer til Spania fríggjadagin telur 29 fólk, harav eru 14 fimleikarar. Restin eru venjari, avvarandi og onnur úr Støkk.

# Venjarar tikið UEFA-B skeiðið

**Seks føroyskir fótbóltsvenjarar kunnu nú breggja sær av at vera UEFA-B venjarar eftir at hava fingið prógv handað frá FSF**

VENJARASKEIÐ
*Stefan í Skorini*



*Nýklaktu UEFA-B venjararnir frá vinstru: Hans Mourits Foldbo, skeiðleiðari, Bill McLeod Jacobsen úr KÍ, Pætur Smith Clementsen úr HB, Páll F. Joensen úr FS Vágum, Finn Johannesen úr KÍ, Bogi Lervig úr LÍF, Abraham Løkin úr NSÍ og Petur Simonsen, skeiðleiðari*

Hetta venjaraskeiðið er tað fyrsta av sínum slag í Føroyum, og tað er samstundis góðkent av UEFA. Skeiðið er ein samanseting av trimum skeiðum, sum eru ungdómsvenjaraskeiðið, seniorvenjaraskeiðið og tann sonevndi Slóðarin, sum eisini er seinasti partur av UEFA-B venjaraskeiðnum.

Skeiðið tekur tríati tímar tilsamans, har venjararnir m.a. skulu læra at leggja eina langtíðar eins og eina styttri venjingarætlan. Eisini skulu teir læra at menna tann einstaka spælaran á liðnum og at enda er tað tann persónliga menningin av venjaranum sjálvum og tann pedagogiska síðan av venjingini, sum skal styrkjast.

Skeiðleiðararnir, Petur Simonsen og Hans Mourits Foldbo, hava verið úti og vitjað venjararnar undir venjingum, og allir venjararnir hava eisini verið savnaðir á teoretiskum skeiðum.

FSF hevur í longri tíð arbeitt við at fáa allar síni venjaraskeið góðkend av UEFA, og frá næsta ár verður farið undir ein nýggjan leist, sum er skræddaraseymaður av UEFA. FSF hevur skipað fyri hesum skeiðnum í tøttum samstarvi við Dansk Boldspil Union.

Teir seks nýggju UEFA-B venjararnir, sum júst hava fingið prógv eru Bill McLeod Jacobsen og Finn Johannesen úr KÍ, Pætur Smith Clementsen úr HB, Bogi Lervig úr LÍF, Abraham Løkin úr NSÍ og Páll F. Joensen úr FS Vágum.